heilsutrygd
Kommunulæknaskipanin
Postsmoga 52
Tlf. +298 61 40 00
T-post: heilsutrygd@heilsutrygd.fo


# Vegleiðing um klagur viðv. tænastustøðinum í kommunulæknaskipanini

## Mælt verður til, at tú lesur hesa vegleiðing, áðrenn klagufrymilin verður útfyltur

Í hesi vegleiðing greiða vit tær eitt sindur frá, hvussu Heilsutrygd viðgerð klagur um tænastustøði í kommunulæknaskipanini (kommunulæknar, kommunulæknavikarar, sjúkrarøktarfrøðingar og læknaskrivarar).

Vit vilja fegin, at tú brúkar okkara klagufrymil, tá tú sendir inn klagu. Á henda hátt fáa vit so neyvar upplýsingar sum møguligt; og tað merkir, at vit skjótari kunnu viðgera tína klagu. Samstundis gevur tú okkum heimild til at savna tær upplýsingar, sum eru neyðugur fyri at viðgera klaguna.

**Fulltrú**

Tað er møguligt at annar persónur umboðar teg í klagumálinum. Um tú ynskir at nýta hendan møguleikan, so skalt tú útfylla fulltrú, sum er sjálvum klagufrymilinum.

**Klagur um tænastustøði**

Her klagar man yvir tænastu, sum ein hevur fingið hjá viðkomandi heilsustarvsfólki. Klagast kann eitt nú yvir: bíðitíð, atburð, at kommunulæknin ikki vil taka ímóti tær sum sjúklingi, ella/og øðrum starvsfólki hjá kommunulækna ella í læknavaktini.

Tað er týdningarmikið, at tú í klaguni greitt greiðir frá tí tú ynskir at klaga yvir.

Tað er týdningarmikið at gera vart við, at Heilsutrygd ikki kann viðgera klagur um heilsufakliga viðgerð. Klagur um læknans heilsufakligu kanningar ella viðgerð skulu sendast beinleiðis til Sjúklingakærunevndina (Patientombuddet – POB, www.patientombuddet.dk) ella til Landslæknan, www.landslaeknin.fo

**Klagu freistir**

Klagur um tænastustøði í kommunulæknaskipanini skulu verða Heilsutrygd í hendi í seinasta lagi 6 vikur eftir, at tú ert vorðin varugur við viðurskiftini, sum liggja til grund fyri tíni klagu.

**Viðgerar tíðar**

Viðgerartíðin fyri klagur um tænastu eru ymiskar frá máli til mál. Tá talan er um fyristitingarligar avgerðir, so er vanligt at viðgerin tekur uml. tveir til tríggjar mánaðir

**Samband**

Hevur tú spurningar í hesum sambandi ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á: 614000 ella heilsutrygd@heilsutrygd.fo